## UTTAN ÚR HEIMI

## Vilja hava kvinnu til biskup

Í 1994 sluppu kvinnur at virka sum prestar í anglikonsku kirkjuni í Bretlandi, og í dag er fimti hvør prestur kvinna. Men tað er ikki nóg mikið, siga summi, og tey krevja nú, at Bretland skal fáa sín fyrsta kvinnuliga biskup.

Tað ljóðar, at leiðslan í kirkjuni er ikki serliga fegin um hugskotið, men kortini stendur í einari frágreiðing hjá kirkjuni, at Bretland kann fáa sín fyrsta kvionnuliga biskup í 2012. Í frágreiðingini verður sagt, at tað fer at taka sína tíð at fáa ta fyrstu kvinnuna í eitt bispaembætið, tí slík embæti eru ikki leys á hvørjum ári, og harafturat er neyðugt, at minst ein kvinna er skikkað til embætið.

## Bílig arbeiðsmegi í Noregi

Tey seinastu árini er virksemið í norsku byggivinnuni økt nógv, men kortini vísa hagtøl, at talið á arbeiðsleysum handverkarum hevur verið veksandi.

Orsøkin er, at norsk byggifeløg og norskir smiðir verða skúgvaðir til viks, og at smiðir úr teimum eysturevropeisku londunum verða boðsendir ístaðin fyri, tí teir krevja ikki so høga løn sum teir norsku smiðirnir, skrivar Aftenposten. Hetta sæst eisini aftur í hagtølunum. Í fjør høvdu 23.000 eysturevropearar arbeiðsloyvi í Noregi, og tað var tvær ferðir so nógv sum í 2002.

Enn hevur tann útlendska arbeiðsmegin ikki tikið arbeiðið frá so nógvum norskum smiðum, tí virksemið í byggivinnuni er so stórt. Men talsmenn hjá handverkarafeløgunum siga, at minkar virksemið, verða teir norsku smiðirnir koyrdir til hús fyrst, tí teir eru dýrari enn teir útlendsku. Tí vilja feløgini hava politikararnar at skipa so fyri, at teir útlendsku smiðirnir skulu hava somu løn sum teir norsku fyri at javna kappingina.

## Mótmæli í Mongolia

Umleið 2.000 fólk gingu mánadagin mótmælisgongu í mongolska høvuðsstaðnum Utam Bator. Tey mótmæltu korrupsjón í almennu umsitingini og løgdu Nambaryan Enkhbayar, forseta undir at vera tanbn ringasta svikaran. Tí kravdu tey, at forsetin fer frá, og at tjóðartingið verður sent til hús.

– Nú er neyðugt við broytingum. Vit gerast fátækari fyri hvønn dag, sum fer, samstundis sum teir almennu rænastumenninir verða ríkari og ríkari. Nú má okkurt henda, stóð á flogseðlum, sum mótmælisfólkini høvdu við sær. Tey róptu eisini, at kollveltingin er byrjað, og at mongolska fólkið svøltar. Kortini var mótmælisgongan friðarlig.

Politiskur ruðuleiki hevur valdað í Mongolia, síðani ein av flokkunum tók seg burtur úr stjórnarsamgonguni í síðstu viku. Flokkurin vil vera við, at forsætisráðharrin hevur gjørt alt ov lítið fyri at fáa enda á korrupsjónini í almennu umsitingini og at loysa teir stóru trupulleikarnar av fátækradøminum í landinum.

## Veturin kravt nógv mannalív

Veturin hevur verið sera ringur í Japan við nógvum kava, og higartil hevur vetrarveðrið kostað 95 mannalív, skrivar AP úr Tokyo.

Myndugleikarnir siga, at veturin hevur verið serliga ringur har norðuri í landinum. Tann seinasta mánaðin hevur tað kavað sera illa har, og nógvastaðni hava myndugleikarnir sent hermenn at hjálpa fólki, sum hava verið innikavað. Umleið 2.000 hermenn hava tikið lut í arbeiðinum at rudda kava av húsatekjunum og at grava fólk út.

Sambært myndugleikunum er hetta tann ringasti veturin í meiri enn 20 ár. Veturin 1983-84 var eisini ógvuliga ringur, og tá doyðu 131 fólk.

Ferðslutrygd 30 ár:

# Carlson kunnar seg um føroyska vegakervið



*Thomas Carlson, fjølmiðlaleiðari hjá NTF í Svøríki, koyrir í hesum døgum kring landið og kunnar seg um føroyska vegakervi*

**Í sambandi við ráðstevnuna um ferðslutrygd í Norðurlandahúsinum hósdagin 19. januar, er høvuðsrøðarin á ráðstevnuni, Thomas Carlson, fjølmiðlaleiðari hjá NTF í Svøríki, komin til landi fyri at kunna seg um føroyska vegakervi**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Fyrsti røðarin á ráðstevnuni „Lívsneyðug ráðstevna - RFF 30 ár", Thomas Carlson, sum er fjølmiðlaleiðari hjá ráðnum fyri ferðslutrygd í Svøríki, NTF (Nationalföreningen för Trafiksäkerhetens Främjande), er komin til Føroyar nakrar dagar áðrenn ráðstevnuna fyri at kunna seg um vegakervið í Føroyum.

Hetta er triðju ferð at Thomas Carlson er í Føroyum. Hesaferð er tað við tí fyri eyga at síggja hvussu føroyska vegakervið sær út, serliga við atliti til ferðslutrygd. „Hetta er avgjørt ein fyrimunur, tá eg skal halda fyrilesturin í Norðurlandahúsinum, sigur Thomas Carlson við Sosialin.

Fyrilesturin hevur fingið heitið „Nollvisionen - utopi eller verklighet".

Niðurstøðan hjá Carlson er, at ein ferðsla, har øll akta lógirnar, kann gerast ferðslutrygg - sæð í tí ljósinum er Nullhugsjónin eingin utopi, sigur hann.

Tað er Synergi, sum skipar ráðstevnuna fyri Ráðið fyri Ferðslutrygd.

# Møtirøð við Bill & Sheila Meerstra

TÍÐINDASKRIV

NTM.fo, føroyska greinin av New Tribes Mission, fær í komandi viku vitjan av hjúnunum Bill og Sheila Meerstra úr Canada. Tey virka sum umboðsfólk fyri New Tribes Mission í Canada. Bill og Sheila hava verið á skúla saman við fleiri føroyskum trúboðarum, m.a. Símun í Túni, trúboðara í Venesuela og Ragnar Niclasen, trúboðara á Filipsoyggjunum. Bill hevur eisini undirvíst í mong ár á venjingarskúlanum hjá NTM í Canada.

Tey koma til Føroyar hósdagin 19. januar og steðga her til týsdagin 31. januar.

Meðan tey eru her, luttaka tey á møtum á hesum støðum: Ebenezer í Havn, Hebron á Argjum, Berøa í Saltangará, Lívdini í Hoyvík, Salem á Tvøroyri, Vitninum í Hvalba, Betesda í Klaksvík, Saron á Viðareiði.

Sí annars lýsing aðrastaðni í blaðnum.



*Hjúnini Bill og Sheila Meerstra úr Canada vitjað í Føroyum í døgunum 19. – 31. januar*